gult8 cyan8 magenta8 svart8



## DAGSINS MEINING

# Søgulig og virðisleys samtykt

Tað var ein søguligur dagur fríggjadagin, tí henda dag samtykti ein meiriluti í Løgtinginum uppskotið um "sjálvstýri Føroya fólks". Uppskotið til samtyktar er største samtykt á sjálvstýrisleið, tí eftir henni skal føroyska heimastýrið taka yvir eini 10 málsøkini í seinasta lagi 1. Januar 2002. Harafturat skal heildarveitingin lækkast millum 300 og 400 milliónir krónur frá sama degi!

Talan er um eitt uppskot til samtyktar, sum hevur gildið í 12 ár, og ikki um eina lóg. Harafturat er vert at leggja til merkis, at tað eydnaðist ikki landsstýrinum at fáa stóra andstøðuflokkin, Javnaðarflokkin, við í meirilutan. Hetta kann ikki merkja annað enn, at landsstýrið sjálvt leggur lítið í virðið á samtykt og ætlan, tí spurningurin er, hvat hendir eftir komandi val.

Sum er, hevur landsstýrið einans tvær atkvøður í meiriluta, men eftir fleiri veljarakanningum kann tað henda, at landsstýrið fer at missa henda meiriluta. Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin standa fyri afturgongd, og tí kann støðan lættliga gerast hon, at neyðugt verður annaðhvørt at fáa Javnaðarflokkin ella Miðflokkin við í eina nýggja samgongu.

Men tann støða kann eisini taka seg upp – tá veljarin sær álvaran at lækka blokkin 400 milliónum í einum – at Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin fáa helvtina ella meirilutan í Løgtinginum, kanska saman við einum av smærru flokkunum. Spurningurin er, hvat virðið eitt uppskot til samtyktar tá hevur? Einki, hevur Sambandsflokkurin sagt!

Sjálvandi skuldi landsstýrið roynt at fingið Javnaðarflokkin við, og tikið undir við tí meiri hóvliga tilmæli hansara. Tað miðjaði í móti at lækka heildarveitingina stívliga 100 milliónir og taka yvir eini trý málsøki hetta árið. Hesin møguleiki – kanska eitt sindur størri upphædd og okkurt málsøki afturat – hevði skapt møguleika fyri einum konsensus-politikki. Harafturat høvdu vit fingið prógvað, hvat árin tað hevði havt á føroyska búskapin at klípa einar 120-150 milliónir burtur úr, í staðin fyri at skera heilar 400 milliónir burturúr.

Flestu føroyingar vilja hava sjálvstýri og taka størri ábyrgd á seg, men spurningurin er, um henda samtyktin ikki ræðir fólk, og gevur Sambandsflokkinum betri byr til komandi val. Tí er spurningurin, hvat virðið landsstýrið leggur í eina óbindandi samtykt við lítlum meiriluta?

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Økismenningarálitið/Suðuroyggin

**Jacob Vestergaard**



Í Økismenningarálitinum verður, sum vera mann, støðan í Suðuroynni viðgjørd, men fellur nevndin, sum hevur gjørt álitið, í somu grøv sum so nógv onnur, tá talan er um Suðuroynna.

Sum eg havi sagt áður, er Suðuroyggin ikki bert Tvøroyri ella bert Vágur, ella bert Tvøroyri og Vágur, men øll Suðuroyggin við tils. 7 kommunum.

Tað eru ikki bert Tvøroyri og Vágur, sum hava tørv á útbyggingum, men eisini hinar kommunurnar í Suðuroynni. Tað átti nevndin at kannað, tá hon hevur gjørt sær ómak at kanna viðurskiftini í ávísum kommunum.

Fortreytirnar fyri framburði eru eins góðar á Lopransfjørði og Hvalbiarfjørði, sum á Vágs- og Trongisvágsfjørði.

Sumbiar Kommuna hevur m.a. tørv á at útbyggja Loprans Havn, sum frá náttúrunnar hond kanska er besta havnin í Suðuroynni, bæði til kyrru og dýpd.

Hvalbiar Kommuna hevur sjálv gjørt stórar íløgur fyri at betra um havnarviðurskiftini, sum ikki hava verið nøktandi til tað virksemi, har er.

Hinar kommunurnar í Suðuroynni hava somuleiðis fyri neyðini at betra um havnaviðurskiftini.

Allar kommunurnar áttu at verðið viðgjørdar undir einum og felags niðurstøða gjørd hesum viðvíkjandi. Landið eigur at stuðla hesum, tí allar játtanir um stuðul blivu strikaðar uttan at kommunurnar fingu nakað afturfyri.

Tá hetta er sagt, skal eisini sigast, at álitið annars er væl úr hondum greitt og eitt gott amboð hjá politisku flokkunum at nýta.

Suðuroyggin er eitt gott stað hjá øllum at búgva, og hjá mær er ongin ivi um, at Suðuroyggin fer at menna seg aftur.

Vit hava tó brúk fyri einum meira fjølbroyttum arbeiðstilboði, so okkara ungu fólk, sum eru burtur og nema sær hægri útbúgving, kunnu koma heim aftur til okkara vøkru oyggj.

Hetta hevur verið okkara høvuðstrupulleiki, tí vit hava ikki havt nakað arbeiði at bjóða teimum lutfalsliga mongu suðringum, sum hava verið burtur og nomið sær hægri útbúgving, og tí hava hesi búsett seg aðrastaðni.

Um politisku flokkarnir meina nakað við tað teir siga, kunnu teir hjálpa okkum við hesum og harvið skunda undir framburðin í Suðuroynni.

Tað er onki til hindurs fyri at flyta alment virksemi til Suðuroynna, t.d. eitt aðalstýri við avvarðandi stovnum, tí í dag ber til at samskifta uppá allar mátar, um fortreytirnar verða skaptar fyri tí.

Tað vísir seg nevniliga ikki at vera nakar trupulleiki at flyta stýrir millum teir ymisku bygningarnar í Tórshavn.

Fyri at skapa somu fortreytir fyri vinnulívið í Suðuroynni sum aðrastaðni, kundu politisku flokkarnir byrjað við at latið suðuroyingar sloppið at nýta sín landsveg, Smyril, sum flestu føroyingar, uttan at skula gjalda fyri tað.

Hetta kostar sjálvsagt nakað, men vegakervið, sum verður brúkt av øllum, kostar eisini samfelagnum nógv í viðlíkahaldi v.m.

Vónandi druknar Økismenningarálitið ikki í berari vælvild, sum onkur tók til undir framløguni í VB-húsinum, men at politisku flokkarnir veruliga meina nakað við tað teir siga. – Livst so spyrst.

# Tøkk til SvF og sangarar

**Torleif Johannesen**

Tað var við spenningi, at eg langa fríggjadag setti meg at hyggja at sendingini »Páskasangir á Toftum. Sigast skal beinanvegin, at eg bleiv bæði glaður og takksamur fyri sendingina. Hon var bæði góð og fjølbroytt. Eitt frálíkt tiltak. Tað bæði sást og hoyrdist, at fólk høvdu lagt nógva orku í at fyrireika seg væl, so tøkk skulu tit fáa fyri tað. SvF skal eisini hava eina tøkk fyri, at tit vilja gera tílíkar sendingar. Eg havi hoyrt viðmerkingar til sendingina frá fólki ymsastaðni frá í landinum, og niðurstøðan er tann sama: Ein frálík sending! Og so hava tey flestu lagt afturat: »Tað skuldu bara verið fleiri tílíkar sendingar í SvF!«.

Hervið er tøkkin og áheitanin send víðari.

# Yvirlýsing frá Kvinnufelagssamskipan Føroya

YVIRLÝSING
*Inga Ellingsgaard, forkvinna*

Umboðsfundur KSF's hildin í Mettustovu í Havn tann 21. apríl 2001, tekur undir við sjónarmiðunum hjá Javnstøðunevndini í málinum um samskatting av hjúnum og mótmælir harðliga, at trupulleikar á barna- og umsorgarsøkinum verða loystir við at skerja persónliga frælsið hjá teimum, ið eru gift.


**Sosialurin**

| | |
|---|---|
| **Sosialurin** | Stovnaður: 1927 |
| **Ábyrgdarblaðstjóri:** | Jan Müller jan@sosialurin.fo |
| **Blaðstjóri:** | Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo |
| **Tíðindaleiðari:** | Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo |
| **Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo | Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo; Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo; Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo |
| **Blaðfólk:** | Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo; Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo; John Johannessen john@sosialurin.fo; Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo; Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo; Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo |
| **Ítróttur:** | Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo |
| **Myndamenn:** | Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo; Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo |
| **Sosialurin í Norðoyggjum:** | Postsmoga 231, Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík, tel. 458686 fax 458687, e-post: klaksvik@sosialurin.fo |
| **Útgevari/uppseting:** | Sp/f Sosialurin, Prent: Prentmiðstøðin |
| **Avgreiðsla:** | Mán.-frí. 8-16, Argjavegur 26, Tel. 311820, Fax 314720 |
| **Postadressa:** | Postboks 76, 110 Tórshavn |
| **E-mail:** | post@sosialurin.fo, lysing@sosialurin.fo, lysingartorg@sosialurin.fo |

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


gult9 cyan9 magenta9 svart9



# Mótmæla vantandi kunning frá Tórshavnar býráð

TÍÐINDASKRIV
*Foreldrafelagið í Havn*

Fríggjadagin 20. apríl 2001 frættist, at Tórshavnar Kommuna hevði sent út brøv um stovnsplássini komandi. Tórshavnar Kommuna hevur valt bert at boða teimun frá, sum hava fingið pláss. Tey sum ikki fáa stovnspláss á hesum sinni, fáa einki at vita frá kommununi. Orsakað av hesi mannagongd eru nógv, sum um hesa tíðina hvørt árið gerast meira ørkymlaði, enn neyðugt er.

Í hesum sambandi mótmælir Foreldrafelagið tí manglandi kunning og manglandi innliti Tórshavnar Kommuna gevur sínum viðskiftarfólki, bæði viðvíkjandi árligu brøvini um stovnspláss og viðvíkjandi bíðilistanum. Foreldrafelagið heldur, at Tórshavnar Kommuna eigur at broyta verandi mannagongd og skapa størri opinleika í hesum máli.

Í sambandi við árligu fráboðaninar um stovnspláss eiga eisini tey, sum einki stovnspláss fáa, at verða kunnaði skrivliga. Hesi eiga at kunnast um, hví tey ikki hava fingið stovnspláss á hesum sinni, og hvat nummar tey so eru á bíðilistanum. – Men hesir upplýsingar eiga ikki bert at verða tøkir einaferð um árið. Ein skipan eigur at verða gjørd, so at til ber hjá øllum, til eina og hvørja tíð, at fáa innlit í bíðilistan, bæði fyri at síggja, hvat nummar á bíðilistanum ein er, og fyri at fáa innlit í deilingina av stovnsplássum í økinum.

Foreldrafelagið ger at enda vart við, at felagið í fleiri ár hevur átalað mannagongdina hjá Tórshavnar Kommunu í hesum máli. Felagið hevur fleiri ferðir víst á, at einasta gongda leið er størri opinleiki. Hóast hetta, hevur Tórshavnar Kommunu ikki broytt mannagongd, til stóran ampa fyri viðskiftarfólki.

# Hongur ikki saman hjá landsstýrinum

TÍÐINDASKRIV
*Vága Sambandsfelag*

Valfelag sambandsfloksins í Vágum skipar fyri almennum fundi á Hotel Vágum kl 20.00 tann 24-04-01. Á fundinum luttaka tveir av ungu limum Sambandsfloksins, Olav Enomoto og Eivind Jacobsen.

Teir hava saman við serkønum útgreinað avleiðingarnar av seinasta loysingaruppskoti landstýrisins. Teir eru komnir til ta niðurstøðu, at ætlanir landsstýrisins snøgt sagt ikki hongur saman. Próvtilfarið er millum annað heintað úr hvítu bók.

Nýskipanaruppskot Sambandsfloksins verður bjóðað fram sum einasta gongda leið til frama fyri alt Føroya fólk.

Eisini verður løgtingsumboð floksins við á fundinum.

# Flaggdagshald á Eiði

Flaggdagshald verður á Eiði flaggdagin klokkan 15.00.

Ítróttarfólk og skúlabørn fara at ganga skrúðgongu úr Múlavík heim á Vaglið. Fólkið, sum skal ganga í skrúðgonguni, verður biðið at møta í Múlavík klokkan 14.30.

Tá skrúðgongan er komin heim á Vaglið, fer Kjartan Stakksun at halda flaggrøðuna, og orkestur við næmingum úr musikskúlanum Norðljómi fara at spæla. Aftan á verður ein drekkamunnur at fáa í EB húsinum.

Tað er Eiðis Bóltfelag, sum skipar fyri flaggdagshaldinum á Eiði.




# Flaggdagshald á Giljanesi

Flagdagshald verður í Ítróttarhøllini á Giljanesi flaggdagin kl. 16. Torbjørn Jacobsen landstýrismaður í mentamálum heldur flaggrøðuna, og Sørvágs Tónleikarafelag og Ungdómsorkestrið í Vágum, undir leiðslu av Steven Foggin, spæla.

# Flaggdagshald í Hvalvík

TÍÐINDASKRIV
*Skótaliðið Borgin*

Skótaliðið Borgin skipar fyri flaggdagshaldi í skúlagarðinum í Hvalvík 25.04. 2001 kl. 15.00. Lassi Klein flytur fram røðu.

Aftan á verður kaffisøla, mattombola og lutaseðlasøla til frama fyri skótaliðið.

Heitt verður á skótar og ítróttarfólk um at møta í skótahúsinum kl. 14.30.

# Átta ferðslubøtur í Klaksvík

FERÐSLUKANNING
*Eirikur Lindenskov*

Mikudagin gjørdi løgreglan í Klaksvík ferðslukanningar – grein 13 kanningar – ymsastaðni í býnum í Klaksvík.

Átta bilførarar vórðu skrivaðir, og teir fáa sendandi eina bót. Tilsamans vóru ferðslulógarbrotini 18 í tali, og tey vóru m. a., at bilførari ikki hevði koyrikortið hjá sær, nýtti fartelefon, meðan koyrt var, nýtti ikki trygdarbeltið, barnið var ikki í trygdarbelti, nærljósini vóru ikki tendrað og so vóru ymisk sløg av brekum við ljósum.